# KT-fólk til Atlants Tøkni



**Atlants Tøkni** · Jónas Broncksgøta 35
Postsmoga 277 · FO-110 Tórshavn
Tel 347 280 · Faks 347 281
att@att.fo · www.att.fo

Virksemið hjá KT-fyritøkuni Atlants Tøkni er í støðugari menning, og søkt verður nú eftir einum KT-serfrøðingi og einum KT-forritara til starvsfólkahóp okkara.

## KT-serfrøðingur

Tú hevur fleiri ára royndir at menna ritbúnað. Harumframt hevur tú:

- Hægri útbúgving í KT, tvs. embætisprógv ella ph.d.
- Sjálvstøðugt arbeiðslag
- Áræði, hug og evni áhaldandi at tilogna tær nýggja vitan og tøkniligar førleikar

Tann, ið fær starvið, fer at:

- Hava tøkniligu ábyrgdina av verkætlanum
- Standa fyri arbeiðinum at byggja upp KT-skipanir frá grundini
- Leggja til rættis og ganga á odda, tá nýggjar loysnir skulu mennast

## KT-forritari

Tú hevur útbúgving í KT (bachelor, kandidat ella líknandi) og helst eisini royndir á økinum. Ert tú um at gera útbúgving tína lidna, hoyra vit eisini fegin frá tær. Arbeiðið fevnir um at menna KT-skipanir í breiðum týdningi.

Tann, ið fær starvið, verður við í nýskapandi verkætlanum og gerst partur av einum fakliga mennandi arbeiðsplássi. Tøkniligu starvsøkini eru:

- .NET
- Visual Studio
- C++
- C#
- Oracle
- Java
- JDeveloper

Fyri bæði størvini er galdandi, at ein fær góða løn, ið svarar til førleikarnar. Send okkum umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi.

NEMA

Atlants Tøkni er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.

**Atlants Tøkni**

REPROZ

# Kundaráðgevi til Vinnulívsdeildina í Havn

Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar og fevna um alt samskiftið við vinnulívskundar okkara.



Eik

pelur & pelur 320 780

**Tínar uppgávur verða**
- at ráðgeva, røkja og hava ábyrgd av vinnulívskundum
- uppsøkjandi arbeiði úti hjá vinnufyritøkum
- lánsviðgerð

**Fakligir førleikar**
Tú hevur førleikar í roknskapargreining og hevur viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving ella aðra búskaparliga/handilsliga útbúgving.

**Persónligir eginleikar**
Vit leita eftir einum starvsfelaga, ið dámar væl at hava tætt samband við viðskiftafólk. Tú ert uppsøkjandi, hevur eyga fyri sølu, hevur góð samstarvsevni og dámar væl at arbeiða í einum skundmiklum og støðugt skiftandi umhvørvi.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Birgir Nielsen, telefon 348630, teldupost birgir.nielsen@eik.fo ella við Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, telefon 348510, teldupostur marjun.eystberg@eik.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett sambært avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 19. okt. 2007.

**Umsóknin skal sendast til:**
Eik
Att: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

**Les meira um starvið á**
www.eik.fo